Fyrsti tingfundur:

# Nýtt ting í nýggjum tingi



*Løgtingið er nú farið undir eina nýggja tingsetu. Húsið er sum nýtt, og tað er partur av tingmanningini eisini. Løgtingið fer nú til verka.*

**Nýggi Løgtingið hevur nú havt sín fyrsta fund. Edmund Joensen varð valdur til løgtingsformann við sekstan atkvøðum. Fyrsti tingfundurin varð eisini merktur av, at tingmenn skuldu venja seg við eina nýggja skipan**

LØGTINGSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

**Løgtingið:** Mikudagin kom nýggja Løgtingið eftir løgtingsvalið 30. apríl saman fyri fyrstu ferð.

Undan fyrsta tingfundinum var serliga stórur spenningur um, hvør fór at gerast tingformaður. Hesin gjørdist Edmund Joensen úr Sambandsflokkin, sum fekk sekstan atkvøður. Einki nevndarval var á skránni. Tað er formaður, ið ger av, um hetta skal gerast.

Tinghúsið er umvælt innan og uttan. Alt var ikki heilt liðugt, men tað var ein heilt øðrvísi salur, ið tingmenn tóku í nýtslu.

Áhugin fyri tingfundinum var stórur, og tingmenn høvdur eisini funnið fínu klæðini fram, og onkur helt seg heldur ikki aftur við at fara í føroysku klæðini.

Tað vóru formel mál á skránni. Tingmenninir skuldi góðkennast, og hetta tók sína tíð, tí tingfólk í smáum bólkum skuldu fáa greiðu á, hvørt tað nú var, sum var valdur.

Alt gekk tó upp á stás við tí, og allir tingmenninir kunnu nú kenna seg vísar í, at teir eiga teirra sæti í Løgtinginum.

Heini O. Heinesen er elsti tingmaðurin, og hann fekk tí heiðurin at seta tingi, og hann virkaði sum tingformaðurin tann størsta partin av fundinum.

Vilhelm Johannesen gjørdist fyrsti tingmaður, ið slap at royna nýggja røðarapallin í tinginum.

Fyri landsstýrismenn, ið eisini eru valdir á ting, komu varamenn ístaðin. Hesir vóru: Jákup Mikkelsen, Norðoyar valdømi, Jóanis Nielsen, Vágum, og Poul Michelsen, Suðurstreymoy, allir úr Fólkaflokkinum.

Fyri Høgni Hoydal tók Jógvan Arge sæti á tingi.

## Edmund formaður

Stóri ivamálið um løgmansformanninum er nú loyst. Edmund Joensen er valdur sum tingformaður.

Trý uppskot vóru: Edmund Joensen, Hergeir Nielsen og Óli Breckman. Sambært tingskipanini, so skuldi fyrst atkvøðast um allar, men eingin tær seytjan atkvøðurnar og harvið meirilutan Edmund fekk sekstan, Hergeir níggju og Óli sjey atkvøður. Sostatt skuldi ein triðja atkvøðugreiðsla til, har atkvøtt bert var millum Edmund Joensen og Hergeir Nielsen. Edmund Joensen fekk við hesa atkvøðugreiðsluna sekstan atkvøður, meðan tað ikki eydnaðist Hergeir at savna meira enn 13. Tað vóru Fólkaflokstingmenn, ið býttu seg millum at atkvøða fyri Hergeir Nielsen og at atkvøða blankt.

Jenis av Rana úr Miðflokkinum valdi at stuðla Heirgeir Nielsen.

Edmund Joensen segði, eftir at hann varð valdur, at hann vildi arbeiða fyri alt tingið. Hann segði seg vera fegnan um at hava fingið hendan álitissess.

Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin stuðlaðu Edmundi, og tað var eisini Jóannes Eidesgaard, ið skeyt hann upp.

Jóannes Eidesgaard segði eftir fundin, at teir mettu Edmund sum ein skikkaðan formann og ein virðiligan formann, og teir valdu sostatt at stuðla honum.

Kári P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum heldur eisini, at Edmund Joensen er ein virðiligur formaður. Hann leggur afturat, at hann var tann einasti av teimum í uppskoti, ið hann hevði upplivað sum tingformann, tá hann hevur verið limur í formansskapinum seinastu fýra árini sum ein av varaformonnunum.

Fyrsti avgerðin hjá nýggja tingformanninum var, at einki nevndar val skuldi vera.

–Eg ætli mær at arbeiða sum tingformaður sum fyri alt tingið – bæði andstøðu og samgongu, sigur Edmund Joensen.

Hvar er ja?

Tað var eisini skemtiligt í tinginum mikudagin. Tingmenn hava fingið messtum nýtt tinghús, og við hesum eisini eina nýggja skipan, sum skal nýtast tá tingmenn skulu atkvøða. Hendan var tó ikki so løtt hjá øllum at hava við at gera.

Hvar er ja, spurdi ein tingmaður, tá atkvøðast skuldi fyri tingformanninum.

Eisini gekk stundum eitt sindur striltið við at fáa alt avgreitt, soleiðis sum tað átti. Alt kom tó upp á pláss, og nýggi tingsalurin og nýggi tingmanningin eru nú staðfest og tikin í nýtslu.



*Elsti tingmaðurin ráddi fyri borgum til tingið hevði valt Edmund Joensen sum nýggjan tingformann.*



# Mest dioksin funnið í lomvigareggum



*Dioksininnihaldið í seyði kann samanberast við dioksininnihaldið í kúgvarmjólk, tá royndir verða heintaðar á einum og sama stað*

**Dioksininnihaldið er kannað í seyði, kúgvarmjólk, toski, grindahvali og lomviga. Avgjørt hægsta innihaldið av dioksin er funnið í lomvigareggum, verður staðfest í Føroya umhvørvi í tølum 2001**

UMHVØRVI
*Turið Kjølbro*

Síðani 1991 hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan gjørt regluligar kanningar av seyði, fyri at finna fram til, hvussu nógv dioksin er í teimum. Til hesar kanningarnar er nýrutálg frá seyði úr Eysturoy, Streymoy, Skúvoy og Koltri brúkt. Ein av orsøkunum til, at seyður er valdur til kanningina, er, at føroyingar eta nógv seyðakjøt. Hetta stendur at lesa í bóklinginum Føroya umhvørvi í tølum 2001, sum er komin út fyri stuttum. Aðra staðni er meiri vanligt at kanna dioksininnihaldið í mjólk.

Í bóklinginum stendur at lesa, at dioksininnihaldið í seyði kann samanberast við dioksininnihaldið í kúgvarmjólk, tá royndir verða heintaðar á einum og sama staði. Sum onnur aromatisk klorerað evni, eru dioksin feittloysilig og verða seint niðurbrotin. Við øðrum orðum hópa hesi seg upp í føðiketunum.

Mark er sett fyri, hvussu stórt inntakið av dioksin kann vera, eins og við øðrum eitrandi evnum. Hetta markið nevnist TUI, sum stendur fyri Tolerabelt ugentligt indtag, og hevur verið 2100 pg, men síðani 2001 hevur ES rátt til, at markið verður lækkað niður í 840 pg fyri hvørt fólk. Norsk kanning vísir til, at fólk har í landinum fingu umleið 35 prosent av gomlum TUI í seg, helvtina úr mjólk og margarini og umleið 5 prosent úr seyðafeitti.

Dioksintølini úr Noregi, Týsklandi, Svøríki og Hálandi, sum eru frá 1990 til 1999, liggja úr 0,31 til 1,80, sum er eindin í TCDD-equivalentum í pg/g feitti. Nýggjastu føroysku tølini liggja úr 0,24, sum er av ær í Koltri upp í 2,80, sum er av lambi í Leirvík.

### PCB

Í 1995/96 varð seyðafeittið eisini kannað fyri koplanar PCB kongen, sum eru tey mest heilsuskaðiligu kongenini, og PCB 126 hevur fingið ein TEF á 0,1. Tað merkir, at hetta evnið er ein tíggjundapart so vandamikið, sum tað mest eitrandi dioksinið. Í føroyska seyðinum var PCB 126 einsamalt atvoldin til 90 prosent ella meiri av tí toxisku dosuni, sum stendst av hesum koplanu PCB-unum.

### Mjólkin

Føroysk kúgvarmjólk er eisini kannað fyri dioksininnihald. Fyri at gera kanningina so umboðandi sum til ber, er mjólk frá trimum teimum størstu mjólkarbóndunum kannað, og umframt eru royndir tiknar á mjólkarvirkinum av lidnari vøru. Hesar royndir vórðu tiknar seint í 1999.

Verður føroyska mjólkin borin saman við mjólk úr Danmark, Finnlandi, Svøríki og Noregi, er dioksininnihaldið í føroysku mjólkini í niðari helvt, á støði við tøl úr Finnlandi. Føroysku tølini liggja frá 0,36 til 0,52.

### Eggini

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eisini kannað dioksininnihaldið í toski, lomviga og grindahvali. ES-londini hava samtykt eina strategi fyri at basa dioksini í umhvørvinum og hava tískil gjørt tilráðingar viðvíkjandi hægst loyvda innihaldinum av dioksini í fóðuri.

Viðvíkjandi grindini, hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan latið kannað spik frá grindahvali fyri dioksininnihald í tveimum umførum. Fyrru ferð í grindini í Vestmanna í juni 1996 og seinnu ferð í grindini í Havn í september í 2000. Yvirhøvur er rættiliga javnt innihald av dioksin í vaksnu dýrunum, frá umleið 8 ngTEQ/g fiti til 13 ngTEQ/g fiti.

Kanningin av lomvigareggum umfatar lomvigaregg heintað á Torkilshálsi í Skúvoy. Tíggju av hesum vórðu kannað fyri PCB, pestisidir og dioksin. Í mun til dioksinkanningar av øðrum, eru avgjørt hægsta innihaldið av dioksin funnið í lomvigareggum. Lagt verður tó afturat í kanningini, at lomvigaregg í Føroyum kortini ikki eru serliga illa dálkað við dioksini.

Kanningin vísir, at innihaldið av dioksinum og koplanum PCB-um í lomvigareggum var nógv hægri enn í grindahvalinum, og kundi ein møgulig frágreiðing uppá hetta kanska verið, at hvalurin er betur enn fuglurin til at niðurbróta júst hesi evni.

# Føroyskt umhvørvi í tølum

**Endamálið við útgávuni, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur staðið fyri, er at gera almenningin kunnugan við vísindaligar kanningar**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur givið út áhugaverdan bókling um føroyska umhvørvið í tølum. Bóklingurin, sum eitur Føroya umhvørvi í tølum 2001, er triðja útgávan av sínum slag. Í honum eru yvirlit yvir kanningar av umhvørvisligum týdningi, ið eru gjørdar í Føroyum.

Fyrsta útgávan Føroya umhvørvi í tølum 1997 varð prentað í 100 eintøkum, sum vísti seg at vera alt ov fá. Onnur útgávan, sum kom tvey ár seinni, var tískil fyri ein part uppafturprent av teirri fyrru, tó við nýggjum tølum eisini. Tað nýggja, sum er við í bóklinginum, sum júst er komin, er parturin um dioksin, sum víst verður til á hesi síðuni eisini.

Í kunningini í sambandi við útgávuna, sigur skrivarin í arbeiðsbólkinum, Maria Dam, at dentur eru lagdur á tíðarrøðir av kyksilvur-kanningum í hesum bóklinginum. Tað vil siga, at hugt verður at broytingum í kyksilvurinnihaldinum yvir eitt tíðarskeið, sum helst skal røkka aftur til tíðina fyri ídnaðarkollveltingina. Sagt verður, at kanningarnar ikki eru lidnar, men at fyribilsúrslitini eru áhugaverd.

Ætlanin við hesi frágreiðingini er, at úrslit frá teimum kanningum, sum verða gjørdar innan karmarnar av »Umhvørviseftiransingarætlan fyri Føroyar«, og sum hava týdning fyri fatanina av føroyska umhvørvinum yvirhøvur, koma almenninginum til kunningar.

Frágreiðingin er skrivað soleiðis, at hon í stuttum hevur eina yvirlitsmynd av úrslitum frá teimum kanningum, sum eru framdar. Dentur er lagdur á djór, annaðhvørt tí tey hava týdning sum matvøra, ella tí tey orsakað av livihátti og útbreiðslu eru egnað at greiða frá føroyska umhvørvinum. Frágreiðingin skal kunna nýtast av lærarum og næmingum í framhaldsflokkum, lesandi, politikarum og fólki, sum eru áhugað í umhvørvisviðurskiftum yvirhøvur.

Frágreiðingin byggir víðari á ætlan frá arbeiðsbólki, sum í november 1991 varð settur at gera uppskot til umhvørviseftiransingarætlan fyri Føroyar. Hetta uppskot varð latið Føroya landsstýri á vári 1995, og á heysti sama ár gjørdi Føroya Landsstýri av at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Náttúrugripasavn, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Fiskirannsóknarstovuni. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur havt fyrisitingarliga myndugleikan. Í stórum mun er frágreiðingin skrivað av fólki haðani, eins og undanfarnu bóklingar. Týðandi partar eru tó skrivaðir av fólki frá hinum stovnunum eisini.

# Kvinnuskeið um sjálvsmenning

**Ivast tú í tínum kvinnuvirði, er nú møguleiki at fara á skeið og menna teg sjálva. Skeiðið, sum er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum, verður hildið í Havn í døgunum 1.-2. juni í ár**

KVINNUSKEIÐ

Ert tú konufólk og hevur áhuga fyri at menna teg persónliga, hevur júst hetta skeið kanska tín áhuga.

Skeiðleiðari er Anette Sundby. Hon var í Føroyum í heyst og helt eitt væleydnað skeið. Nú roynir hon eydnuna aftur.

– Ein ferð byrjar altíð við fyrsta fótafetinum, sigur Anette Sundby, sum seinastu fýra árini hevur hildið serstakt skeið fyri kvinnur.

Ein orsøk til, at hetta er kvinnuskeið burturav, kemst av, at kvinnur kenna seg tryggari og kunnu betur tosa um síni viðurskifti sínamillum, tá ið tær eru í bólki fyri seg.

Anette Sundby er upprunaliga útbúgvin fólkaskúlalærari, men hevur seinastu 12 árini skipað fyri skeiðsvirksemi, har hon m.a. lærir kvinnur, hvussu tær kunnu mennast og soleiðis styrkja sjálvsvirðið.

– Nógvar kvinnur koma á hesi skeið, tí at tær hava hug at læra okkurt nýtt, ella tí tær standa á einum vegamóti í lívinum, har teimum tørvar at læra meiri um teirra persónligu eginleikar, sigur Anette Sundby.

Orsøkin til, at hon hevur ment hesi serligu kvinnuskeið, er, at hon hevur verið fyri stórum mótburði í lívi sínum. Tað hevur gjørt, at hon ofta hevur ivast í sínum kvinnuvirði. Fyri at vinna á ivanum hevur hon stríðst fyri at endurskapa kensluna av síni styrki sum kvinna. Tað eru m.a. hesar royndir, sum Anette Sundby vil bera víðari til sínar medsystrar.

Skeiðið er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum. Ert tú áhugað fyri at læra okkurt nýtt, sum kann menna teg í arbeiðs- og persónliga lívinum, er hetta skeiðið kanska ein møguleiki. Skeiðið er ikki nakar »undurkurur«, men meira ein byrjan til eina prosess, har tú fært hugskot og íblástur m.a. til at skapa broytingar í lívsgrundarlagnum, sum tú kanska droymir um, men ikki veitst, hvussu tú skalt fremja.

Á skeiðnum er møguleiki at gera sær tankar um lívið, at hugsa seg gjølla um og at arbeiða fram ímóti at seta sær nýggj stevnumið.

Skeiðið verður í Stoffalág 82, 1.-2. juni , frá kl. 9-17 báðar dagar. Luttakaratalið er avmarkað til í mesta lagi 16 luttakarar. Kostnaðurin er 1850 krónur, íroknað skeiðtilfar og kostarhald.

Áhugaðar kunnu fáa nærri upplýsingar um kvinnuskeiðið við at ringja á tlf. 315298 ella við at fara inn á heimasíðuna www anettesundby.dk